# Viðtøkur

*Føroya Væl*

*Veljarafelag Sambandsfloksins í Suðurstreymoy*

Mars 2013

**Viðtøkur**
fyri veljarafelag Sambandsfloksins í Suðurstreymoy ”FØROYA VÆL”.

## § 1. Hugtak

Navn felagsins er veljarafelag Sambandsfloksins í Suðurstreymoy ”FØROYA VÆL”. Heimstaður felagsins er Tórshavn.

## § 2. Endamál

Endamál felagsins er at virka fyri politisku hugsjónum Sambandsfloksins, sum tær eru lýstar í stevnuskrá floksins.

## § 3. Limaskapur

Limur í felagnum kann gerast ein og hvør, sum hevur valrætt til bygda/býráðs-, løgtings- og fólkatingsval, og sum hevur heimstað í Suðurstreymoyarøkinum. Atkvøðurætt í felagnum hevur limur aftaná 3 mánaða limakap.

## § 4. Aðalfundurin

Aðalfundurin er hægsti myndugleiki í øllum felagsins viðurskiftum. Ársaðalfundur verður hildin í januar ársfjórðingi og skal fráboðast minst 14 dagar frammanundan.

Á fundarskránni skulu hesi punkt vera við:

1. Val av fundarstjóra
2. Formaðurin greiðir frá virki felagsins í farna ári
3. Kassameistarin greiðir frá fíggjarligu støðuni - grundað á grannskoðaðan roknskap
4. Limagjald fyri komandi ár
5. Viðgerð av innkomnum uppskotum
6. Val av nevndarlimum, tveimum tiltakslimum og grannskoðara
7. Ymist

## § 5. Nevndin

Ein nevnd við 5 limum tekur sær av dagligu viðurskiftum felagsins. Nevndarlimir verða valdir fyri 2 ár, soleiðis at annahvør ársaðalfundur velur 2 limir og annahvør 3 limir. Møguleiki er fyri afturvali.

Seinast 3 vikur aftan á aðalfund skipar nevndin seg við formanni, næstformanni og skrivara. Nevndin setur kassameistara.

Nevndin skal góðkenna umsóknir um limaskap.

Formaðurin skipar fyri nevndarfundi minst eina ferð hvørt fjórðingsár. Regluligir nevndarfundir verða innkallaðir skrivliga. Fundarstað, -tíð- og -skrá verða tilskilað.

## § 6. Viðtøkubroytingar

Á aðafundi og eykaaðalfundi kunnu bert uppskot, sum eru á fundarskránni- og broyting-aruppskot til hesi - koma til atkvøðugreiðslu.

Viðtøkubroytingar kunnu bert fremjast um meira enn helmingurin av limum felagsins atkvøða fyri. Um ikki nóg nógvir limir eru møttir á aðalfundi, skal uppskotið leggjast fyri eykaaðalfund og krevst tá, at 2/3 av møttu limunum atkvøða fyri.

Eykaaðalfundur skal vera fráboðaður í Dimmalætting minst 14 dagar frammanundan.

### § 7. Eykaaðalfundur

Eykaaðalfundur kann verða innkallaður av nevndini ella um minst 10 limir, skrivliga, seta fram ynskir um tað við fráboðan av fundarskrá. Seinast 14 dagar aftaná, at slík skrivlig áheitan er nevndini í hendi, skal hon boða til eykaaðalfund.

### § 8. Tíðarfreistir

Uppskot til viðgerðar á aðalfundi skulu latast formanninum 5 dagar fyri fundin.

Uppskot um broytingar í viðtøkunum skulu latast formanninum innan 1. januar.

### § 9. Atkvøðugreiðslur

Við atkvøðugreiðslu ræður reglan um reinan meirluta (ein atkvøða yvir helmingin av teimum greiddu atkvøðunum). Blankar atkvøður verða at meta sum greiddar atkvøður.

Við atkvøðugreiðslur har fleiri valevni skulu stillast upp, kann prioriteringshátturin ella aðrir atkvøðuhættir verða nýttir.

Atkvøðast kann ikki við fulltrú.

### § 10. Reglur fyri atkvøðugreiðslu

Øll nevndarval og valevnisval skulu vera eftir skrivligum uppskoti og skulu, um fleiri eru skotin upp enn veljast skulu, fara fram við skrivligari atkvøðugreiðslu.

Øll onnur skulu fara fram við skrivligari atkvøðugreiðslu, tá ein fimtapartur av teimum møttu, ið atkvøðurætt hava, ynskja tað, ella um fundarstjórin avger tað.

### § 11. Útihýsing

Nevndin kann sýta fyri at taka upp limir ella útihýsa limum, ið arbeiða ímóti endamáli felagsins. Limir, ið verða útihýstir, hava rætt til at fáa skotið avgerð nevndarinnar inn fyri aðalfundin. Í serligum førum kann ein útihýsing leggjast fyri Landsnevnd Sambandsfloksins.

### § 12. Treytir fyri uppstilling

Í Suðurstreymoy kann eingin verða uppstillaður sum valevni fyri Sambandsflokkin uttan at verða limur í felagnum.

Samtyktar á eykaaðalfundi 21. mai 1990

Broyttar seinast 11. mars 2013